Leygardagur 31. august

SVF

16.00 Robot Wars
16.45 Oggy og kakkulakkarnir
16.50 Teldukæti
17.00 Aftan fyri tónleikin: Depeche Mode
17.45 Vinir — am. rød
18.05 Loynimyndir — am. skemt
18.30 Heidi og fjallaabbin 22:26
18.55 Lassie
19.20 Seinastu búfólkini við Fossá
20.00 Satsa
20.45 Eg og skuggarnir 1:2 - amerikonsk virðislønt stuttrød um Judy Garland
22.15 Inspector Morse: Familjuspæl. Óhóskandi fyri børn
23.55 Mál: Forsetin — amerikanskur spenningsfilmur. Óhóskandi fyri smábørn
01.25 Liðugt

EUROSPORT

07:30 Canoeing: World Championship Spain Seville
08:00 Canoeing (Live): World Championship Spain Seville
10:30 Canoeing: World Championship Spain Seville
13:00 Tennis: Grand Slam Tournament U.S. Open New York United States
14:00 Formula 3000 (Live): International Championship Spa Francorchamps Belgium
15:45 Tennis: New York Stories
16:00 Tennis (Live): Grand Slam Tournament U.S. Open New York United States
17:30 News: Eurosportnews Flash
17:45 Tennis (Live): Grand Slam Tournament U.S. Open New York
22:00 News: Eurosportnews Report
22:15 Tennis (Live): Grand Slam Tournament U.S. Open New York United States
00:45 News: Eurosportnews Report

BBC PRIME

0.05 TLZ: »Great Romances of the 20th Century – Greta Garbo & John Gilbert«
0.35 TLZ: »Great Romances of the 20th Century – Richard Burton & Elizabeth Taylor«
1.05 TLZ: »Conspiracies – Presidents«
1.35 TLZ: »Castles of Horror – Besieged«
2.05 TLZ: »Playing God«
3.00 TLZ: »Quinze Minutes«
3.15 TLZ: »Quinze Minutes«
3.30 TLZ: »Make German Your Business«
4.00 TLZ: »Make or Break – A Toy Story«
4.30 TLZ: »Back to the Floor – Women's Prison USA«
5.00 TLZ: »The Experimenter«
5.20 TLZ: »Numbertime – Number 10«
5.40 TLZ: »Landmarks – Tudors and Stewarts – Henry VIII«
6.00 Just So Stories: »The Cat that walked by himself«
6.10 Playdays: »Whybird Stop«
6.30 Superted
6.40 Superted
6.50 Smart
7.15 Yoho Ahoy: »Fruit«
7.20 Playdays: »Dot Stop«
7.40 Superted
7.50 Superted
8.00 The Borrowers
9.00 The Weakest Link
9.45 Battersea Dogs Home
10.15 Wildlife: »Pygmy Chimpanzee – The last great Ape«
10.45 Holiday Snaps: »Australia/Great Barrier Reef«
11.00 Garden Invaders
11.30 Antiques Roadshow: »Ottawa«
12.00 House Invaders: »Oxford«
12.30 Are you being served?: »Grounds for Divorce«
13.00 What not to Wear
13.30 What not to Wear
14.00 What not to Wear
14.30 What not to Wear
15.00 Dr. Who: »The Five Doctors«
15.25 Dr. Who: »The Five Doctors«
16.00 Top of the Pops
16.30 Top of the Pops Prime
17.00 Liquid News
17.30 Charlie's Garden Army: »Culross«
18.00 Ground Force India Special
18.30 Predators: »The Skills to Survive«
19.00 Wild and Dangerous: »Shark Seas«
19.30 Jeremy Clarkson's Extreme Machines
20.00 Maternity: »Foetal Medicine«
20.50 What the Romans did for us: »Edge of Empire«
21.30 Top of the Pops
22.00 Top of the Pops 2
23.00 Parkinson: »Martine McCutcheon, Jennifer Lopez, Wogan«

BBC WORLD

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Click Online (r)
02:00 BBC News
02:30 Correspondent (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 Fast Track (r)
04:45 Holiday (r)
05:00 BBC News
05:30 Talking Movies (r)
06:00 BBC News
06:30 Africa Direct (r)
07:00 BBC News
07:30 Click Online (r)
08:00 BBC News
08:30 Correspondent (r)
09:00 BBC News
09:10 The Shrine
10:00 BBC News
10:10 Great Railway Journeys: Return Ticket
11:00 BBC News
11:30 Mary Anne's Bikes (r)
12:00 BBC News
12:30 This Week
13:00 BBC News
13:10 The Shrine (r)
14:00 BBC News
14:30 Correspondent (r)
15:00 BBC News
15:10 Earth Summit: The Debate
16:00 BBC News
16:10 Great Railway Journeys: Return Ticket (r)
17:00 BBC News
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 This Week (r)
19:00 BBC News
19:30 Earth Report (r)
20:00 BBC News
20:10 The Shrine (r)
21:00 BBC News
21:30 Talking Movies (r)
22:00 BBC News
22:10 Earth Summit: The Debate (r)
23:00 BBC News
23:30 Africa Direct (r)

3

06:20 Garfield Og Venner
06:45 Garfield Og Venner
07:10 Børnehjørnet
10:20 Alt Under Kontrol
11:20 Harem 2001
12:20 Modeljagten
13:20 Heksene Fra Warren Manor
14:20 Grace And Glorie
16:15 Kærlighedsgaven
18:00 Gitte Nielsen - Gift Til Gods Og Guld
19:00 Tve-Kampen
20:00 The Rainmaker
22:35 Sex & The City
23:15 Sex & The City
23:50 The Blair Witch Project
01:15 Vore Værste r
01:45 Vore Værste r
02:15 Cadillac Jack
04:00 V.I.P.
04:55 Godnat

ÚF

7.00 Tíðindi
7.03 Morgunlestur - Súni Kristiansen á Skála lesur
7.15 Morguntónleikur
7.30 Tíðindi
7.35 Morguntónleikur
8.00 Tíðindi
8.03 Leygarmorgun í studio 5 - Kim Hansen velur tónleikin
9.00 Tíðindi
9.03 Barnaútvarpið (e) - Jonna og Katrin stíla fyri
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Súni Kristiansen á Skála lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 1
10.10 Tit skriva, vit spæla
11.00 Rót og rútma - Petur Rouch velur country tónleik
12.00 Veðurtíðindi
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Dagurðatónar
13.00 Vikan við fer - Dánjal Højgaard ger samandráttin
14.00 Vikuskiftið (e) - Suni Merkistein stilar fyri
15.00 Menuettin - Jóannes S. Hansen skipar fyri.
16.00 Kyrrindi (e) - Tónleikasending hjá Fimmboða Lisberg
17.00 Suggan - Gissur Patursson velur løgini
18.30 Tíðindini
18.40 Ítróttatíðindi
19.00 V4-dráttur
19.05 Summarbland - Robert McBirnie leggur til rættis.
20.00 15 tær bestu - Niels Uni Dam stilar fyri
21.00 Harmonikutónar - Flóvin Jacobsen velur tónleikin
21.50 Hetta heilaga evangeliið skrívar - Jónsvein Bech, prestur, leggur til rættis
22.00 Tíðindi

Rás

9.45 Orðið - Bibliulestur v/ Anju Hansen
10.00 HB-Rásin (e) - Endursending frá fríggjadegnum - Sending um og við fólki frá ítróttarfelagnum HB
11.00 Tónleikur
13.00 Á Torginum (EvR) (e) - Endursending frá týsdegnum 6. november 2001 - Samrøða við Rosu Petersen, Klaksvík - Svenning av Lofti leggur til rættis
14.30 Tónleikur
17.00 Fólk á rásini - Vagnur Michelsen leggur til rættis
18.00 Tónleikur
20.00 Beatin - Tónleikasending fyri ung - Eyðfinn Drewsen leggur til rættis
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bibliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
0.00 Liðugt

Sjónvarpið

09.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
09.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
09.30 Tónleikasending fyri børn
10.00 Norðurlenskur tónleikur
11.00 Alpha og Omega, v/Maritu og Egin Henriksen (e)
13.00 Dagsskrá verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
14.00 Brot og bitar, samandráttur frá tíðindasendingunum frá farnu viku.
14.30 Tónleikur fyr børn
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen (e)
16.00 Tónar og innihald v/Høgni H. Hansen og Jan Zachariassen (e)
17.00 Sjómansendingin Vitin v/M.C.Restorff
18.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.05 Mangt & Hvat v/Preben Hansen
20.00 Tónleikur fyr børn
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
21.00 Leygarkvøld í Lindini v/Dánial á Dul Jacobsen
22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Dagsskrá fyri sunnudag verður lisin
23.10 Vón fyri teg, v/Sólbjørg, Solveig o.a.
02:00 Tónar & Innihald (e)
03.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a..
06.00 Vit gevast

Sunnudagur 1. september

SVF

12.50 Formil 1 koyring úr Belgia
15.20 Andala og Sofiannguaq
16.00 Ungdómsmøti úr Zarepta
16.55 Gull og grønar skógir — danskur familjufilmur
18.30 Litla bjørn 20:26
19.00 Satsa e
19.50 Andakt við Jákup Olsen
20.00 Borð um borð
20.55 Frú Marianna 2:4 — svensk kærleiksrað
21.55 Eg og skuggarnir 2:2 - amerikonsk virðislønt stuttrød um Judy Garland
23.25 Liðugt

EUROSPORT

07:30 Canoeing: World Championship Spain Seville
08:00 Canoeing (Live): World Championship Spain Seville
09:30 Sidecar: World Championship Germany Oschersleben
10:00 Motocross (Live): World Championship Czech Republic Loket
11:00 Superbike (Live): World Championship Germany Oschersleben
11:45 Superbike: World Championship Germany Oschersleben
12:00 Supersport (Live): World Championship Germany Oschersleben
13:00 Canoeing: World Championship Spain Seville
13:30 Tennis: Grand Slam Tournament U.S. Open New York
14:30 Superbike (Live): World Championship Germany Oschersleben
15:30 Tennis: New York Stories
16:00 Tennis (Live): Grand Slam Tournament U.S. Open New York United States
17:30 News: Eurosportnews Flash
17:45 Tennis (Live): Grand Slam Tournament U.S. Open New York
22:00 News: Eurosportnews Report
22:15 Tennis (Live): Grand Slam Tournament U.S. Open New York United States
00:15 News: Eurosportnews Report

BBC PRIME

0.00 TLZ: »TLZ: »Supernatural Science – Extraterrestrial Life«
1.00 TLZ: »Secrets of World War II – The End of the Scharnhorst«
2.00 TLZ: »TLZ: »Tobacco Wars – Smokescreen«
3.00 TLZ: »Jeunes Francophones – Je T'aime«
3.20 TLZ: »French on a Plate – Lyon Et Savoie«
3.30 TLZ: »Buongiorno Italia! – Casa, Famiglia E Lavoro«
4.00 TLZ: »Manchester Utd & The Counterfeit Game«
5.00 TLZ: »Watch – Art Start«
5.20 TLZ: »Landmarks – Geography Postcards – World Environmental Changes«
5.40 TLZ: »Megamaths – Problem Solving – Measure Mass and…«
6.00 Yoho Ahoy: »Buzz«
6.05 Toucan Tecs: »Ice Cream Scream«
6.15 Playdays: »Playground Stop«
6.35 Superted
6.45 Superted
6.55 Bright Sparks
7.20 Yoho Ahoy: »Freeze«
7.25 Playdays: »Patch Stop«
7.45 Superted
7.55 Superted
8.05 Blue Peter
8.25 Blue Peter
8.45 Top of the Pops Prime
9.15 Totp Eurochart
9.45 Battersea Dogs Home
10.15 Zoo Keepers
10.45 Holiday Snaps: »Cotswolds/Isle of Wight/Scotland«
11.00 Garden Invaders
11.30 Antiques Roadshow: »Whitchurch«
12.00 House Invaders: »Hove«
12.30 To The Manor Born
13.10 Eastenders Omnibus
13.35 Eastenders Omnibus
14.05 Eastenders Omnibus
14.35 Eastenders Omnibus
15.00 S Club 7 Special: »Back to the 50s«
16.00 Top of the Pops 2
16.45 The Weakest Link
17.30 Gardeners' World
18.00 Diana's Dresses
18.50 The Art of Diana
19.40 Last of the Summer Wine: »It all began with an old Volvo Headlamp«
20.10 Very Important Pennis
20.35 French and Saunders: »Christmas Special«
21.25 French and Saunders: »Spring Special«
22.05 French and Saunders: »Christmas Special«
22.30 Bottom: »Finger«
23.00 Best of British: »Lenny Henry«
23.35 Dr. Who: »The Five Doctors«

BBC WORLD

00:00 BBC News
00:30 This Week (r)
01:00 BBC News
01:30 Fast Track (r)
01:45 Holiday (r)
02:00 BBC News
02:30 Africa Direct (r)
03:00 BBC News
03:30 Correspondent (r)
04:00 BBC News
04:30 This Week (r)
05:00 BBC News
05:30 Mary Anne's Bikes (r)
06:00 BBC News
06:30 Reporters
07:00 BBC News
07:30 Is Another World Possible? (r)
08:00 BBC News
08:30 Earth Report (r)
09:00 BBC News
09:30 This Week (r)
10:00 BBC News
10:10 Earth Summit: The Debate (r)
11:00 BBC News
11:30 Click Online (r)
12:00 BBC News
12:30 Africa Direct (r)
13:00 BBC News
13:10 Great Railway Journeys: Return Ticket (r)
14:00 BBC News
14:30 Reporters (r)
15:00 BBC News
15:05 Dateline London
16:00 BBC News
16:10 The Shrine (r)
17:00 BBC News
17:30 Fast Track (r)
17:45 Holiday (r)
18:00 BBC News
18:10 Earth Summit: The Debate (r)
19:00 BBC News
19:30 Africa Direct (r)
20:00 BBC News
20:10 Great Railway Journeys: Return Ticket (r)
21:00 BBC News
21:30 Mary Anne's Bikes (r)
22:00 BBC News
22:30 Dateline London (r)
23:00 BBC News
23:30 Reporters
23:45 Asia Today

3

05:25 Garfield Og Venner
05:50 Garfield Og Venner
06:15 Børnehjørnet
09:25 Indiana Jones Pâ Nye Eventyr
11:10 Robinson: Opgøret Er I Gang
17:30 Felicity
18:30 Heksene Fra Warren Manor
19:30 Onside
21:00 Universal Soldier: The Return
22:35 Midnight Man
00:20 Vore Værste r
00:50 Vore Værste r
01:20 Free Of Eden
03:00 V.I.P.
03:55 Godnat

ÚF

10.00 Tíðindi
10.05 Sunnudagsløtan - Jonna og Katrin leggja til rættis
10.30 Sálmar og sangir (e) - Janus Mohr leggur til rættis
11.00 Guðstænasta í Christianskirkjuni í Klaksvík - Niels Pauli Danielsen, prestur, prædikar.
12.10 Grammofonkonsert
12.45 Dagurðatónar
13.10 Niðursetileiðarin - Páll Danielsen lesur fyrra part av stuttsøgu, sum Alex Sólstein hevur týtt eftir amerikanska skaldið John Steinbeck.
13.40 Gav skaldaorðum mál og lag - Føroyskir sangir. Janus Mohr leggur til rættis
14.00 Tíðindini
14.15 Kvøðuljómar
15.15 Frásøgn frá fótbólti
17.00 Villar viddir (e) - Studio Pegasus skipar fyri
18.00 Tónatutl - Bitar úr søguni hjá felagnum Tutl. Hans Egholm stílar fyri
18.30 Tíðindi
18.40 Ítróttatíðindi
19.00 Klassiskt sunnukvøld - Edvard Nyholm Debess leggur til rættis
21.00 Veðurtíðindi

Rás

9.45 Orðið - Bibliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Tónleikur
13.00 Kelduvaðið (EvR) - Páll, Brynleif og Maria Poulsen siga frá um kristiboðan - Høgni Johannesen, trúboðari, talar yvir meginlærur Bibliunnar - Hesaferð: Hvør er hin Heilagi Andin
13.45 Tónleikur
16.00 Barnarásin - Oddbjørg og Lissi leggja til rættis
16.30 Tónleikur
20.00 Kelduvaðið (EvR) (e) - Endursending frá kl. 13.00 í dag - Páll, Brynleif og Maria Poulsen siga frá um kristiboðan - Høgni Johannesen, trúboðari, talar yvir meginlærur Bibliunnar - Hesaferð: Hvør er hin Heilagi Andin
21.00 Tónleikur
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bibliulestur v/ Anju Hansen
21.25 Tónleikur
23.00 Liðugt

Sjónvarpið

09.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
09.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
09.30 Barnalindin beinleiðis sending úr studio A, vertur er Liv Jacobsen
10.00 Lovsangur
12.00 Møti
13.00 Dagsskrá verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
13.30 Lovsangur
14.30 Barnalindin Barnasending v/Liv Jacobsen (e)
15.00 Sjómansendingin Vitin v/M.C.Restorff (e)
16.00 Teldan velur løg
17.55 Dagsins orð, eftir Svenning av Lofti.
18.00 Tónleikasending fyri tilkomin v/Steindor Hjaltalin og Tórbjørn Láadal
20.00 Barnalindin Barnasending v/Liv Jacobsen (e)
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
21.00 Møti (e)
22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Dagsskráin fyri mánadag verður lisin
23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a..
06.00 Vit gevast

Avgerð takast um Stuðulsstovnin

Annlis Bjarkhamar, landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum, fer í næstum at taka avgerð um, hvar Stuðulsstovnurin skal liggja í framtíðini. Hon vil frammanundan ikki útihýsa, at stovnurin fer at liggja aðrastaðni enn í Runavík.

ØKISMENNING
Jón Brian Hvidtfeldt

Hvør verður uppgávan hjá Stuðulsstovninum í framtíðini, og hvar kann uppgávan røkjast best? Hesar spurningar hevur Annlis Bjarkhamar sett sær, nú greiða skal fáast á, hvar Stuðulsstovnurin skal liggja í framtíðini. Síðan táverandi landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum, Torbjørn Jacobsen, fyri góðum tveimum árum síðan boðaði frá, at Stuðulsstovnurin skuldi flytast úr høvuðsstaðnum til Runavíkar, hevur stovnurin at kalla hingið í leysari luft. Stuðulsstovnurin húsast sum er í hølunum hjá Mentamálaráðnum við Hoyvíksvegin í Havn.

Terji á Lakjuni, leiðari á Stuðulsstovninum sigur, at verandi støða kann ikki halda fram.

- Tað er sera ringt at menna stovnin, tá vit ikki vita, hvar framtíðin hjá honum liggur. Eisini er tað ørkymlandi fyri starvsfólkini, og tí verði eg noyddur at fáa svar skjótt, sigur Terji á Lakjuni. Fyrrverandi landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum, Óli Holm, setti eina kanning í verk av støðuni hjá Stuðulsstovninum. Har kom fram, at tey seks starvsfólkini á stovninum vóru alt annað enn fegin um at flyta úr høvuðsstaðnum. Eisini mælti leiðarin á Stuðulsstovninum tá frá at flyta stovnin. Grundgevingarnar hjá Terja á Lakjuni vóru tá, at serkunnleikin verður mistur, samstarvið við aðrar stovnar viknar, umframt at stovnurin gerst dýrari at reka.

Nú liggur avgerðin um Stuðulsstovnin á borðinum hjá Annlis Bjarkhamar. Landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum er klár yvir at verandi støða skapar ótryggleika á Stuðulsstovninum. Og hon ásannar, at títta vaktarskiftið á brúnni í Mentamálastýrinum seinastu árini hevur gjørt, at málið hevur tikið alt ov langa tíð at avgreiða. Landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum lovar, at ein endalig avgerð verður tikin um stovnin innan fáar vikur. Annlis Bjarkhamar sigur, at hon fyrst má seta seg inn í málið og kanna, hvørjar grundgevingarnar og fortreytirnar á sinni vóru fyri, at stovnurin skuldi flytast til Runavíkar.

- Mítt útgangsstøði er politiska útmeldingin hjá undanmanni mínum um, at stovnurin skal flytast til Runavíkar. Men áðrenn eg taki endaliga avgerð, fari eg at seta mær sjálvum spurningin, hvar uppgávan hjá Stuðulsstovninum verður røkt best. Spurningurin eigur at setast, hóast vit longu hava eina politiska útmelding í málinum, sigur Annlis Bjarkhamar. Hon leggur afturat, at eisini skulu starvsfólkini vera tikin við upp á ráð.

Sostætt er ikki vist, at tað júst verður Runavík, sum í framtíðini verður heimstaður hjá Stuðulsstovninum, og arbeiðspláss hjá teimum seks starvsfólkunum á stovninum. Annlis Bjarkhamar sigur, at Stuðulsstovnurin í framtíðini kemur at vera fyri broytingum og vísir á, at stovnurin sum frálíður skal fevna um øll føroysk lesandi uttanlanda.

- Tí er neyðugt, at vit finna bestu loysnina, har stovnurin hevur møguleika fyri at menna seg, sigur Annlis Bjarkhamar. Hvørt tað verður í Runavík, í Havn ella kanska onkra heilt aðrastaðni, hevur hon enn ikki tikið endaliga støðu til. Men ein avgerð skal takast innan heilt fáar vikur, leggur Annlis Bjarkhamar afturat.

Annlis Bjarkhamar, landsstýrismaður, fer í næstum at taka støðu til, hvar Stuðulsstovnurin skal liggja í framtíðini.
Mynd: Savnsmynd

Sum er fyriliggur ein tilráðing frá serkunnleika um at flyta Stuðulsstovnin til Runavíkar. Landsarkitekturin hevur verið og hugt at hølum til stovnin í Runavík, og m.a. hevur verið uppá tal at stovnurin skal húsast í hølunum hjá Tjaldurs Apotekinum í Runavík.

Tobbi:

Avgerðin er tikin

Torbjørn Jacobsen tók avgerðina um at flyta Stuðulsstovnin úr Havn til Runavíkar. Hann metir onga orsøk vera at taka málið upp av nýggjum nú. Politiska avgerðin er longu tikin, sigur tingmaðurin, sum fer at tryggja sær, at avgerðin verður fylgd.

ØKISMENNING
Jón Brian Hvidtfeldt

Avgerðin um at flyta Stuðulsstovnin úr Havn til Runavíkar skal als ikki viðgerast av nýggjum. Avgerðin er tikin, og hon eigur at verða framd í verki, ongantíð ov skjótt. Tað sigur Torbjørn Jacobsen, fyrrverandi landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum. Tað var hann, sum upprunaliga tók avgerðina um at flyta stovnin. Torbjørn Jacobsen vísir á, at seinni hevur Óli Holm, sum eitt skifti var landsstýrismaður, staðfest avgerðina hjá sær um at Stuðulsstovnurin skal flytast til Runavíkar. Tað var gjørt í svari uppá skrivligan fyrispurning frá Kára P. Højgaard.

- Tí er tað burturvið, at núverandi landsstýrismaður skal viðgera málið av nýggjum. Tá ein nýggjur landsstýrismaður tekur við, eigur hann at virða, at bindingar fylgja við starvinum, at undanmaður hansara hevur tikið politiskar avgerðir, sum skulu fórast út í lívið, sigur Torbjørn Jacobsen.

Avgerðin um at flyta Stuðulsstovnin er langt síðani tikin og kann ikki broytast, sigur Torbjørn Jacobsen, fyrrverandi landsstýrismaður.
Mynd: Savnsmynd

Hann sigur, at enn hevur hann ikki fingið beinleiðis ábendingar um, at avgerðin ikki verður fylgd, men tingmaðurin ætlar sær at fylgja væl við málinum, nú landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum í næstum fer at taka støðu.

- Vísir tað seg, at landsstýrismaðurin velur ikki at fylgja politisku avgerðini, sum longu er tikin um at flyta stuðulsstovnin til Runavíkar, so fari eg avgjørt at gera mína ávirkan galdandi, sigur Torbjørn Jacobsen, og leggur afturat, at tað ber ikki til hjá einum nýggjum landsstýrismanni bara at skúgva avgerðir hjá undanmanni sínum til viks.

Atdráttarmegin at Havnini

Torbjørn Jacobsen vísir á, at skal nakar stovnur flytast úr høvuðsstaðnum, so krevur tað politiskar avgerðir, sum avvarandi landsstýrismaður má tora at standa við. Hann heldur lítið um, at starvsfólkið ella sjálvur stovnurin skal hava ávirkan á, hvørt stovnurin skal flytast úr høvuðsstaðnum.

- Tú kanst spyrja allar almennar stovnar í Havn um, hvørt teir vilja flyta úr høvuðsstaðnum, men tú kennir svarið frammanundan. Verða tað tí ikki sterkar politiskar avgerðir, sum flyta stovnarnar, so hendir púrt einki, sigur Torbjørn Jacobsen.